TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Líkvognsførari

Tórshavnar kommuna søkir eftir líkvognsførara, at byrja skjótast til ber.

**Arbeiðið umfatar:**
umframt koyring við líkvognunum:
- viðlíkahald av líkvognunum
- reingerð av kapellinum
- annað fyrifallandi arbeiði eftir boðum frá gravaranum
- dagligt samstarv við gravaran

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal:
- hava koyrikort til persónbil
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- vera røkin
- vera fyrikomandi
- vísa umhugsni og hjálpsemi
- hava ans fyri tí serliga starvi, talan er um

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meira fæst at vita**
Áhugað verða biðin um at venda sær til Tóra í Hoyvík býðargartnara, ella Janus Isfelt lønarfulltrúa á tlf. 31 51 60, í seinasta lagi 17. desember 2001.

SNARSKIVAN



## Lærari søkist

Vegna farloyvi, verður søkt eftir lærara til Kvívíkar skúla at byrja 1. januar 2002.

Lærarin, ið settur verður, kemur at undirvísa í føroyskum, rokning og tónleiki, íalt 15 tímar um vikuna.

Starvið er tíðaravmarkað til hálvt ár.

Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Lærarafelagið.

Umsóknir skulu verða Skúlastýrinum í hendi innan 18. des. 2001.

**Skúlastýrið fyri Kvívíkar skúla**
Jan Andreasen
340 Kvívík







UTTAN ÚR HEIMI

# Aftur ísraelskt tyrluálop



**Ísraelskar tyrlur oyðiløgdu í gjár enn eina palestinska løgreglustøð.**

ÚTLAND
*Fartekst*

Bert veir dagar eftir at ísraelskar stríðstyrlur javnaðu høvuðsstøðina hjá palestinsku løgregluni í Gaza-býi við jørðina, søktu tyrlur í gjár at einari løgreglustøð har norðuri í Gaza-geiranum.

Tyrlurnar skutu fleiri rakettir eftir bygninginum, og minst fimm rakettir raktu støðina, sum eisini var miðstøð hjá lívverjuni hjá palestinska forsetanum,Yasser Arafat, teirri sonevndu Deild 17.

Bygningurin varð fullkomiliga lagdur í oyði. Einki varð sagt, at nakar hevði latið lív ella fingið skaða, men sjúkrabilar vóru at hoyra nærhendis húsunum. Eygnavitni greiddu frá, at tað eydnaðist starvsfólkunum at sleppa út, tá tey hoyrdu gangin frá teimum ísraelsku tyrlunum.

Við býin Tulkarm á Vestara Áarbakka doyðu tveir palestinar, tá ísraelskir hermenn loystu skot av eftir einum bili fyri at fáa hann at steðga. Sambært ísraelska útvarpinum skutu hermenninir fyrst ávaringarskot.

Ísraelska stjórnin samtykti sunnudagin at halda fram við álopunum, til teir palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnir taka teir, sum skipaðu fyri sjálvmorðsatsóknunum í Ísrael. Yasser Arafat hevur gjørt greitt, at myndugleikarnir átaka sær onga ábyrgd av atsóknunum, men hann er undir ógvusligum trýsti frá Ísrael og USA, sum vilja hava hann at handtaka teir seku.

Í gjár var uttanríkispolitiski samskiparin hjá ES, Javier Solana, í Ísrael, har hann hitti Ariel Sharon, forsætisráðharra, Arafat og amerikanska semingsmannin, Anthony Zinni.

# Veksandi fátækradømi í Ísrael

**Livikorini hjá fjórða hvørjum ísraelsmanni eru niðan fyri fátækramarkið, vísir ein nýggj kanning.**

ÚTLAND
*Fartekst*

Kanningin vísir samstundis, at alt fleiri og fleiri ísraelsmenn hava verri og verri livikor. Í fjør vórðu góð 1,1 mió. ísraelsmenn roknaðir sum fátækir, men sambært nýggju kanningini er hetta talið nú hálv onnur mió., sigur útvarpið hjá ísraelska herinum.

Millum tey fátækastu eru tey, sum búgva í býnum Bnei Brak nærhendis Tel Aviv. Tey flestu, sum búgva í býnum, hava víðgongdar átrúnaðarligar hugsjónir. Men fátækradømið sæst eisini væl í Jerusalem, verður sagt.

Tað veksandi fátækradømið er eisini ein spegilsmynd av tí veksandi arbeiðsloysinum í Ísrael. Triðja ársfjórðing í ár vaks arbeiðsloysið átta prosent, og í dag hava 9,3 prosent av landsins arbeiðsmegi einki at takast við.

Tær nógv øktu trygdarútreiðslurnar undir palestinska uppreistrinum hava gjørt sítt til, at fátækradømið veksur. Ófriðurin hevur rakt ferðavinnuna serliga meint, og júst ferðavinnan hevur havt stóran búskaparligan týdning fyri Ísrael.


# ítróttur

Nr. 240 • mikudagur • 12. desember 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


# Fleiri spennandi nøvn



*Janus M. Joensen úr HB telist millum fýra spildurnýggjar landsliðsleikarar. Hinir eru Palli Augustinussen úr VB og Tór-Ingar Akselsen og Pól Næs Joensen. Báðir úr HB.*

**Jógvan Martin Olsen hevur boðað frá, hvørjir leikararnir eru, sum skulu við landsliðnum á Cypros, og millum teirra eru fleiri nýggj og spennandi nøvn**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast Føroyar í løtuni ikki hava nakran landsliðsvenjara til manslandsliðið í fótbólti, so merkir hetta tó ikki, at alt arbeiðið kring landsliðið liggur stilt.

Sum tað framgongur aðra staðni í blaðnum, so verður venjingarlega á Cypros fyrst í februar mánaði, og Jógvan Martin Olsen, sum var hjálparvenjari hjá Allani Simonsen, hevur nú gjørt av, hvørjir leikararnir eru, sum skulu við á venjingarleguna.

### Áhugaverd nøvn

Tað er aloftast soleiðis við hesum venjingarlegum, at tað ikki er gjørligt at senda veruliga A-landsliðið avstað, tí fótbóltsútisetarnir aloftast hava torført við at fáa frí til hetta.

Onkur vil kanska meta hetta sum ein ítróttarligan smeit til venjingarnar, men hinvegin verður hetta uppvigað av, at hetta gevur venjarunum møguleika at royna onkur nýggj nøvn, sum ikki hava verið í landsliðsmyndini áður. Í fjør sóu vit millum annað Jón Róa Jacobsen og Hjalgrím Elttør vera við á hesum legum, teir megnaðu tá báðir at sannføra Allan Simonsen um, at teir eiga sítt pláss á landsliðnum í framtíðini.

### Fýra nýggir

Hesa ferð eru so eisini nøkur spennandi nøvn at síggja millum teir 24, sum hava fingið boð.

Spildurnýggir eru Janus M. Joensen (HB), Pól Næs Joensen (HB), Tór-Ingar Akselsen (HB) og Palli Augustinussen (VB). Av hesum er Tór-Ingar Akselsen helst tann, sum av flestum hevur verið roknaður sum næsti nýggi føroyski landsliðsleikarin, meðan hini trý nøvnini øll koma meira ella minni óvæntað. Janus M. Joensen og Paalli Augustinussen hava tó báðir verið fastir á sínum liðum tey bæði seinastu árini, og hava eisini av og á verið nevndir sum komandi landsliðsleikarar.

Feskasta navnið í so máta er helst Pól Næs Joensen, sum í ár hevur verið eykamálverji hjá HB, eftir at hann í vár gjørdi av at skifta frá grannunum úr B36. Úttøkan av Pókl boðar einamest frá, at her hevur Jógvan Martin hugsað nøkur ár frameftir. Lítið er at ivast í, at sum støðan er, eiga bæði Jákup Mikkelsen og Jens Martin Knudsen sínar tryggu sessir á landsliðnum, og tí verður neyvan aktuelt við einum avloysara fyrr enn um nøkur ár, og til ta tíð er HB-málverjin eitt av fleiri evnum.

### Teir royndu

Hinir 20 í hópinum eru so leikarar, sum eisini áður hava verið á landsliðnum, men fyri nakrar er tó galdandi, at teir av ymaum orsøkum ikki hava verið so drúgvir í hesum høpi.

Serstakliga verður spennandi at síggja, hvussu verður við teimum trimum, Pól Thorsteinsson (NSÍ), Bartal Eliasen (GÍ) og Allan Joensen (KÍ). Pól hevur seinastu árini verið mettur sum ein hin besti – um ikki tann besti – verjuleikarin í landinum, men drúgt leikbann og síðani sjálvboðið eksil hava forðað honum í røkka einum hægriu dystartali.

Bartal Eliasen hevur eins og Pól verið mettir millum stinnastu verjuleikararnar, men onkursvegna hevur hann verið sera ódrúgvur í landsliðshøpi. Sjálvur hevur Bartal áður sagt, at landsliðið langt síðani er úttikið, og í so máta kann ein nýggjur landsliðsvenjari verða ein nýggjur íblástur hjá fuglfirðinginum í GÍ-verjuni.

Mest spennandi av hesum trimum er tó kanska Allan Joensen. Klaksvíkingurin varð longu fyri fleiri árum síðani mettir sum ein hin fremsti leikarin í landinum, og var longu blaðungur trygt val millum teir fyrstu ellivu. Síðani hava skaðar í ólukkumát lagt forðingar fyri fótbóltsleið hansara, men í fjør var hann so aftur at síggja á KÍ-liðnum. Eru skaðarnir nú endaliga lagdir aftur um bak, er helst einki at ivast í, at hann eigur sítt sjálvsagda pláss í hópinum.

Annars sær hópurin, sum Jógvan Martin Olsen hevur tikið út, soleiðis út:

Øssur Hansen, Hans Fróði Hansen, Fróði Benjaminsen, B68, Jens Martin Knudsen, Pól Thorsteinsson, Helgi L. Petersen, NSÍ, Sámal Joensen, Bartal Eliasen, GÍ, Jón Rói Jacobsen, Andrew av Fløtum, Tór-Ingar Akselsen, Jóhannis Joensen, Rógvi Jacobsen, Janus M. Joensen, Pól, Næs Joensen, HB, John Petersen, Jákup á Borg, Heðin á Lakjuni, Arnbjørn Danielsen, Klæmint Matras, Jens Kristian Hansen, B36, Palli Augustinussen, VB, Hjalgrím Elttør, Allan Joensen, KÍ.

# Venjaraspurningurin bíðar

**Hóast úttøkan til komandi venjingarleguna longu er farin fram, er venjaraspurningurin hjá fótbóltslandsliðnum ikki avgreiddur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

- Vit eru komnir nakað áleiðis, men enn er so einki at frætta.

Orðini eigur Jens Erik Magnussen, formaður í landsliðsnevndini hjá FSF, tá vit royna at frætta, um nakað nýtt er at hoyra viðvíkjandi venjaraspurninginum hjá føroyska fótbóltslandsliðnum.

### Bíða til januar

Sum tað framgongur aðra staðni á síðuni, so hevur Jógvan Martin Olsen givið 24 leikarum boð um, at teir eru tiknir út til venjingarleguna á Cypros í februar mánaði.

Venjingarlegan er fastur táttur í fyrireikingunum hjá landsliðnum, og tó at venjarin ikki er settur, fer hetta ikki at ávirka, heldur Jens Erik.

- Fleiri umsóknir hava verið um starvið, og nú eru vit so í ferð við at avmarkað talið av kandidatum.

Spurdur, um talan nú bert er um heilt fáar kandidatar, sigur nevndarformaðurin, at nú eru ikki so nógvir eftir.

- Tað er tað, sum eg havi at siga í løtuni. Eg fái hvørki sagt, hvørjir ella hvussu nógvir talan er um. Undir øllum umstøðum hendir einki víðari í málinum fyrr enn í januar, sigur Jens Erik Magnussen at enda.